LM-099/2023

Annika Petersen

Fylgiskjal 80

Fra: Sunnva Asano <sunnva.asano@gmail.com>
Sendt: 23. februar 2024 14:51
Til: VMR-Journal
Emne: Hoyringsskriv

Góðan dagin

Tað er gott at landsstýrið umsíður er komin við onkrum, sum skipar ferðavinnuna og gevur vanliga føroyinginum rætt til at fara út í føroysku náttúruna. Her eru nakrar viðmerkingar til lógaruppskotið:

Fyri tað fyrsta, so eiga hasi tvey tingini nevnd omanfyri ikki at vera í somu lóg. Hvat flestu føroyingar rokna sum ein sjálvsagdan rætt, hevur onki at gera í eini lóg um ferðavinnu!! Her er vert at endurtaka: Rætturin hjá føroyingum at ferðast í føroysku náttúruni hevur onki at gera í eini ferðavinnulóg. Eitt annað, sum heldur ikki hoyrir heima í hasi lógini er paragraf 4, stk 4. Àsetingin um hundar ger seg inn á rættin hjá føroyingum og serliga inn á trivnaðin hjá hundaeigarum og hundum á smáplássunum! Í heila tikið haldi eg, at lógin ger seg inn á trivnaðin á teimum mest útsettu økjunum í Føroyum. Yvirlitið á síðu 10, har tað stendur at uppskotið onga sosiala ávirkan fær, er beinleiðis skeivt og vísir, at tað er gjørt av fólki sum onki kenna til bygdalív á útoyggjum og smáplássum. Tað skal eg siga eitt sindur um:

Tær smáu bygdirnar eru niðurpíndar og hava brúk fyri onkrum, sum kann gera tað liviligari á staðnum. Her kundi ferðavinnan verið ein kærkomin møguleiki. Men ikki, um hon verður styrd sentralt, og bygdin ikki hevur møguleikar at seta forboð fyri handilsligari ferðavinnu, har tað er neyðugt. Tað stendur beinleiðis í lógini, at ikki er loyvt at nokta nøkrum, so leingi sum standardsáttmálin verður fylgdur. Hatta ger, at allir føroyingar (og aðrir ríkisborgarar) kunnu reka handilsliga ferðavinnu um allar Føroyar.. Er tað sosialt burðardygt? Nei! als ikki! Hvør skal so avgerða um ferðavinna skal rekast í økinum? Bøndur og jarðareigarar? Nei, tað riggar heldur ikki, tí støðan á smáplássunum og serliga á útoyggjunum er jú tann, at mesta av jørðini er uttanbýggjajørð, og tá so festibøndur ikki longur hava bústaðarskyldu, hevur bygdin mist nógva ávirkan á sítt nærumhvørvi. Vandi er fyri at jarðareigarar og bøndur seta seg á allar avgerðir ferðavinnuni viðvíkjandi, og tey í bygdini, sum hava hug til ferðavinnuvirksemi ikki sleppa framat. Bygdarfólk, sum hava hug, mugu sleppa at virka innan ferðavinnuna uttan meiri avmarkingar enn tær sum landbúnaðurin og náttúran setur. Her má mann geva bygdini størri avgerðarrætt og ein frammíhjárætt! Føroyingar eiga sjálvandi sum prinsipp rætt til at reka ferðavinnu um allar Føroyar, men tey lokalu eiga at hava ein møguleika at seta avmarkingar. Tí er eitt annað kritikkpunkt ásetingin um at kommunan skal hava so nógv at siga. Tað eru kommunur við nógvum bygdum, og summar bygdir hava onga ávirkan á politikkin í kommununi. Tær staðbundnu nevndirnar eru ikki meira enn ráðgevandi og í teimum sita jú eisini býráðspolitikkarar, so lokala ávirkanin er avmarkað. Skal ein lokal ferðavinnunevnd gerast, so má tað vera teir lokalu ferðavinnuaktørarnir ella tey, sum kundu hugsað sær, at gera nakað við ferðavinnuna lokalt, sum hava sita í henni (og kanska onkur, sum hugsar um trivnaðin á staðnum). Her eru bøndur og jarðeigarar eisini upplagir aktørar.

Annars er at siga um føroysku hagarnar, tvs alla uttangarðsjørðina í Føroyum, at talan er um tvey ting: landbúnað og náttúru. Bæði landbúnaðurin og náttúran hava nógv at siga fyri føroyska mentan og trivnað. Tey hava altíð verið og fara framvegis at vera her í komandi tíðum. Øðrvísi er við ferðavinnuni, og tí eiga hesi tingini ikki at blandast saman í eini lóg um burðardygga ferðavinnu. Hendan lógin er ikki sosialt burðardygg, og eigur at endurskoðast. Ferðavinnan er í broyting um allan heim, serliga orsaka av hópferðavinnuni, sum hevur gjørt skaða á viðkvom øki. Nú verður tosað um **"regenerative tourism"**. Hevði lógaruppskotið verið skrivað við tí slagi av ferðavinnu fyri eyga, so kundi hon eisini verið við til at ment útjaðaran í Føroyum.. Men fyritreytin er at tey lokalu (serliga bygdafólki) verða tikin upp á ráð.

Vinarliga
Sunnvá Asano
Svínoy